Vikuskifti

Nr. 65 • fríggjadagur • 31. mars 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

# The Rasmus ovast á MTV-lista



Rockbólkurin The Rasmus hevur enn einaferð klatrað upp á toppin á einum hitlista hjá MTV. Hesaferð er bólkurin blivin nummar eitt á MTV í Mið- og Suðuramerika

The Rasmus, sum skal spæla á Summar Festivalinum í august, er í hesum døgum á konsertferð í Suðuramerika, og har gongur strúkandi hjá bólkinum.

The Rasmus savnar ikki bara nógvar áhoyrarar til sínar konsertir, teir klára seg eisini væl á hitlistanum hjá MTV Latino, sum sendir til londini í Mið- og Suðuramerika.

Har er sangurin Sail Away júst blivin nummar 1.

Petur Skeel Jacobsen um vikuskiftisveðrið:

## Kavaælingur og sól

Sambert veðurmanninum Peter Skeel fáa fáa gott veður komandi dagarnar við sól og onkrum kavaæli

VIKUSKIFITISVEÐRIÐ
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Tað verður nakað sama veðrið komandi dagarnar. Hann verður mest landnyrðingur í ættini. Onkur kavaæl verða norðanfyri, tó at tey verða fá. Men sum heild fáa vit væl av sól, og tað verður hampuliga gott verður bæði leygardagin og sunnudagin. Mánadagin verður lítið vindur, turt og sól. Í næstu viku sær út til at blíva lýggjari aftur, hann hevur hug til at lækka í útsynning.

Men vit eru í apríl og tað er oftani ógvuliga skiftandi veður sigur Petur Skeel.

Uppá fyrispurning um hvussu leingi vit kunnu rokna við kava sigur Petur Skeel, at tað er ringt at meta um. – Vit vita, at í 1927 kom stórkavi 27. apríl, og tað hevur verið sagt, at hestur er undirkavaður í Kollafjarðardali í juni mánað.

